Til Umhvørvis – og vinnumálaráðið Tórshavn 8.okt.2020
Att; Astrid Reinert Øregaard

Fakfelagssamstarvið tekur undir við broytingunum í løgtingslógaruppskotinum til **broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing (ALS- lógin)** (Norðurlendski sáttmálin um almannatrygd, hækkan av arbeiðsloysisstuðli, eftirlønargjald o.a.)

Viðmerkingar til lægri inngjald

Fakfelagssamstarvið tekur undir við broytingar uppskotinum, ið leggur upp til at ALS-gjaldið lækkar við 0,25% stigum; úr 1,25% niður í 1%. Hesum viðvíkjandi eru ongar viðmerkingar at leggja aftrat.

Viðmerkingar til ALS útgjaldið

Fakfelagssamstarvið tekur undir við at hægst møguligi mánaðarligi arbeiðsloysisstuðulin verður hækkaður úr 17.500 kr. upp í 18.500 kr., og arbeiðsloysisstuðulin pr. dag verður broyttur frá 75% av útrokningargrundarlagnum til 80% av útrokningargrundarlagnum.

Fakfelagssamstarvið tekur eisini undir við at arbeiðsloysisstuðulin verður eftirlønargevandi við tað, at ALS rindar tvungna eftirlønargjaldið sambært eftirlønarlógini á eftirlønarkontu hjá arbeiðsleysum, ið móttaka arbeiðsloysisstuðul. T.v.s., at arbeiðsloysisstuðulin, ið kemur á konto hjá arbeiðsloysistryggjaðum, ikki verður minni aftan á lógarbroytingina, men at ALS umframt arbeiðsloysisstuðulin eisini rindar til tvungna eftirløn hjá tí arbeiðsloysistryggjaða, ið móttekur arbeiðsloysisstuðul.

Hóast Fakfelagssamstarvi tekur undir at mánaðarligi arbeiðsloysisstuðulin verður hækkaður úr 17.500 kr upp í 18.500 kr., so ynskir Fakfelagssamstarvið, at útgjaldið verður hækkað upp aftur í 20.000 kr. eins og tað var áðrenn árslok 2012. Grundgevingin er tann, at hóast prístalið ikki er hækkað nakað serligt síðani 2012, so metir Fakfelagssamstarvið, at kostnaðarstøðið í samfelagnum hinvegin er hækkað munandi síðani 2012. Tí vildi tað verið natúrligt, at útgjaldsloftið verður hækkað upp í 20.000 kr. umframt at arbeiðsloysisstuðulin pr. dag verður broyttur frá 75% til 80 av útrokningargrundarlagnum. Ynskiligt er, at miðja verður eftir at hækka mánaðarliga arbeiðsloysisstuðulin upp í 20.000 kr. so skjótt sum tilber, við tí grundgeving, at haldførið í ALS grunninum er so gott.